

og leitað eftir silvuri og pengum. Nálin visti, at konan átti nógvar knívar og gaflar og skeiðir av trýtornaðum silvuri. Hon átti eisini fleiri penar stakar og alt møguligt. Men pengar átti hon næstan ongar, tí nálin hevði sjálv hoyrt hana sagt í telefonini, at hon átti akkurát fyri billettina aftur og fram. Men ein pungur við fimmkrónum lá í ovastu skuffuni. Tær goymdi hon til grýlurnar, sum plagdu at vitja hana á føstulávint. Røvarin fann pungin og blakaði eisini hann í taskuna. Fyrst hugdi hann í pungin og bannaði so við, at hatta gamla beistið helst hevði sett alt í bankan. Hann helt fram at lýsa og koyra í taskuna, sum nú var vorðin rættiliga tung. Hann kom eisini yvir til vindeygað og lýsti. Tá hann sá nálina, mutlaði hann fyri seg sjálvan, at hasin pinnurin er ikki nógv verdur. Tá helt nálin, at hann var forbiðið frekur, tí hon var sanniliga ikki ein pinnur. Hon var ein nál, hvørki meira ella minni, og ein nál er ikki hvør sum helst. Men tað kundi røvarin sjálvandi ikki vita, tí so hevði troyggjan hjá honum nokk ikki verið so holut.

Eftirhondini var taskan so full, at ikki fekst meira í hana, hóast røvarin royndi alt, hann orkaði, at proppa hana fullari og fullari. Nakrar skeiðir stungu upp úr øðrum reyvalummanum. Nálin helt, tað sá næsta stuttligt út. So slókti hann lyktina og stappaði hana niður í hin reyvalumman og fór gangandi yvir móti úthurðini.

Nálin andaði djúpt inn, men áðrenn hon hevði andað út aftur, bleiv eitt øgiligt rabaldur. Alt var í einum hurlivasa. Tað vísti seg, at ein taxabilur var steðgaður uttanfyri í somu løtu, sum røvarin skuldi fara út. Hann vendi við og kom stormandi yvir ímóti vindeyganum. Hann skræddi krampan av og royndi at sleppa sær út tann vegin. Hann hevði fingið bæði beinini og armarnar útum og setti seg so niður fyri at seta av. Men hvat hendi? Jú, hann seg beint niður á nálina, sum fór langt inn í reyvabøllan á honum. Hann skar í eitt róp og royndi síðani at sleppa sær til rýmingar. Men, men, hann var alt ov tjúkkur. Hann kom bara hálvur út. Rumpan hekk føst í vindeygarammuni.

Inn kom gamla konan við taxamanninum í hølunum. Hon tendraði ljósið og hvakk við. Hon sá bara eina stóra rumpu við einari lummalykt og einari skeið og einari nál stingandi uppúr og hoyrdi nøkur ræðulig ýl, sum komu uttanífrá úr hinum endanum á einum manni.

Hvat í himmalsins navni hendir her? Ætlar tú tær at stjala mína síðstu nál? Konan fór yvir til rumpuna og skrykti nálina til sín. Eitt brøl hoyrdist, og so fór røvarin at gráta. Altíð eri eg líka óheppin, hikstaði hann. Hví kann eg ikki bara fara til arbeiðis sum øll hini. Eg sigi upp sum røvari. Góða kona, hjálp mær úr hesum vindeyganum, so skal eg aldrin stjala nakað aftur í mínum lívi. Taxamaðurin var farin út og runt um húsini. Nú situr tú penur har - fastur í vindeyganum tín apukattur, segði hann við røvaran, sum bara græt. So sá hann taskuna, sum lá á liðini uttanfyri við stakum og silvurtingum stingandi úr. So, tú ætlar tær at stjala frá einari gamlari konu. Nú ringi eg eftir løgregluni! Ja, góði ger tað, græt røvarin. Eg skal nokk taka revsingina. Alt er betri enn at hanga her.

Taxamaðurin ringdi og so skumpaði hann røvaran innum aftur. Tað var eitt ordans bums, tá hann datt niður á gólvið so langur og bøllutur, sum hann var. Røvarin reisti seg upp á knæ og foldaði hendurnar og hugdi bønandi upp á konuna. Orsaka, orsaka, eg skal ongantíð gera tað aftur.

Nálin, sum sat trygt og gott ímillum tummil og fremstafingur á konuni, skilti ikki, at hon hevði verið so bangin fyri hesum manninum. Hon hevði hildið hann verið so ljótan og øgiligan, men nú sá hon, at hann bara var eitt kloddut ólukkudýr, sum helst ongan góðan átti. Tá tókti henni synd í honum!

Eina løtu seinni kom løgreglan eftir røvaranum. Hann fór við uttan at siga eitt einasta orð, hugdi bara við hundaeygum upp á konuna við nálini ímillum tummil og fremstafingur. Tá blotnaði konan og segði við røvaratjóvin. Tað er í lagi við tær, tú ert fyrigivin. Tú vart heppin, at onki verri hendi.

Tann neyðars maðurin smílti eitt evarska lítið smíl og sá beinanvegin eitt sindur frægari út. Vónin birtist í honum, og hann hugsaði, at framtíðin kanska fór at bera okkurt gott við sær til hansara eisini.

Aja, menniskjað er løgið, segði taxamaðurin og setti eina plátu fyri brotna rútin, og so vóru konan og nálin aftur einsamallar.

Nálin sovnaði ímillum tummilin og fremstafingurin á konuni, sum fór yvir til vindeygað og legði hana varisliga niður, har hon hoyrdi heima. Hon boygdi seg niður, kíndi nálini og teskaði, at hon ongantíð skuldi fara frá henni aftur. Tú ert mín einasta og dýrabarasta nál, so eg skal ansa væl eftir tær og taka teg við, um eg fari avstað aftur. Nálin droymdi um gamlar dagar. Tað sást á eyganum, at hon brosaði, har hon lá og svav.

Tveir mánaðar gingu, og jólini nærkaðust.

Ein dagin stóð gamla konan og kókaði kleynur, tá tað bankaði uppá. Hon lat upp og sá ein so snotiligan mann standa á trappusteininum. Hon stúrsaði við, tí hon helt seg kenna hatta eygnabráðið. Kenni eg ikki teg? Jú, svaraði maðurin, eg eri røvaratjóvurin, sum mundi stolið alt frá tær. Men nú er vent í holuni. Eg eri vorðin ein annar maður. Eg drekki ikki brennivín longur, bara eitt sindur á Ólavsøku, og so eri eg farin at læra til brillumann. Tað, sum eitur optikari á onkrum øðrum máli.

Sært tú tað, segði konan, tað vóru gleðilig boð her um høgtíðina. Kom innum og fá tær eina kleynu og ein drekkamunn. Ber ikki jólini útaftur.

Maðurin takkaði og setti seg varisliga niður. Hann var enn eitt sindur eymur har, sum nálin hevði stungið hann.

Hann tók ein lítlan pakka úr jakkalummanum og rætti konuni hann. Her eru nakrar nýggjar nálir til tín. Eg helt kanska, at hin nálin boygnaði eitt sindur, tá hon stakk meg.

Nálin lá í vindeygakarminum í stovuni við stívum oyrum og hoyrdi alt úr køkinum.

Tá maðurin var farin, kom konan inn í stovuna og legði pakkan við nálum undir liðina á gomlu nálini, sum gjørdist ovurfegin. Framtíðin skein eins og nýggja peran í lyktapelanum uttanfyri. Nálin gleddi seg til fara at læra allar hesar fínu nálirnar at seyma og baldýra og prika hol á rullupylsur - eisini tær við nógvum pipari og leyki og salti ikki at forgloyma.

Hetta var søgan um nálina, men nógvar aðrar søgur liggja og bíða eftir, at onkur skal siga tær fyri tær.